# Gestsins eyga

**Fráboðanin í tíðindaskrivi her í blaðnum síðsta leygardag um eina nýuppheinging av føstu framsýningini í Listasavni Føroya vakti alt fyri eitt vónir um eina øðrvísi framsýning, ið veitir høvið til at skoða kend og minni kend listaverk við nýggjum eygum. Tað er nýggi listfrøðingurin í Listasavninum, Ingeborg Bugge, sum stendur fyri hesi nýuppheinging, sum hevur sínir glottar og sum kann viðmælast øllum at síggja, tó at hon fekk ummælaran at ivast stórliga í einum annars álítandi og gestablíðum orðataki, ið sigur, at gløgt er gestsins eyga**

## List



Kinna Poulsen

### Listasøgulig byrjan

Hóast Ingeborg Bugge er gestur her á landi soleiðis at skilja, at hon býr í Århus, hevur hon sjálvandi sett seg inn í føroyska listasøgu, í øllum førum í byrjanina hjá vegarunum Jógvan Waagstein, Niels Kruse og Kristin í Geil, hvørs myndir framsýningin eisini byrjar við. Onkrar av hesum myndum hava helst størri siðsøguligt enn listarligt virði og spurningurin er um ikki tað hevði verið hóskandi við eini sonevndari salonguppheinging av teimum gomlu myndunum. Hetta uppskot verður bert nevnt av tí, at Listaskálanum greidliga tørvar pláss og av tí at plásstrotið í rættiligan stóran mun tykist avgerandi fyri framsýningarúrvalið. Veggirnir í Mikinespýramiduni eru vorðnir gráir og henda dramatiska pallsetingin hóskar serliga væl til tær symbolsk-ekspressivu myndirnar frá 30´unum. Tann Munch inspireraða "Kvøld" hóskar als ikki við síðuna av høvuðsverkinum "Aftur av jarðarferð", eins og tann stóra myndin frá 1960 av monnum, ið skera upp eftir grindadráp kundi verið býtt um við tvær av teimum góðu andlitsmyndunum hjá Mikines. Hinar andlitsmyndirnar kundu verið settar til síðis og á henda hátt varð enn eitt rúm til taks.

### Óskiljandi raðfestingar

Fyrsti klivin er ognaður myndum hjá Ruth Smith, sum sambært Ingálvi av Reyni er einasta listafólki, ið ikki málaði vánaligar myndir. Henda skilagóða tilgongdin heldur fram í næsta kliva, ið inniheldur átta av framúrskarandi myndunum hjá Steffani Danielsen, m.a. hava vit nú høvið at síggja hansara einastandandi sjálvsportrett. Henda fordeilingin gevur listasøguliga meining og tað ger víðari uppheingingin av trimum áhugaverdum myndum hjá Hans í Mikladali eisini. Litgeislandi serstøku myndirnar hjá Arnold Vegghamar hoyra ikki heima í hesum hópinum, men høvdu hóskað betur í samtíðarhøpi. Tummas Arge er væl umboðaður við fleiri framúr myndum, men hiðani gerast raðfestingarnar alt meira óskilligar, eins og tað listasøguliga yvirlitið hvørvur fullkomiliga. Tvær ovurstórar, sera vánaligar myndir hjá Gunleif Grube eru makaðar við tvær góðar, men rættiliga ymishættaðar náttúrulýsingar hjá Bárði Jákupsson frá ávikavíst 1988 og 2003. Valið tykist ikki beinleiðis upplagt av verkunum hjá Beintu av Reyni, sum hevur latið úr hondum myndir, ið eru fleiri ferðir áhugaverdari enn Eminemportrettið.



*Henda frálíka sjálvsmynd Steffan Danielsens er komin upp at hanga*



*Tróndur Patursson framsýningin*

### Grafikkgongin

Janus Kamban er millum okkara allarbestu listafólk, ið átti at fingið eitt pláss fyri seg sjálvan við prentum og standmyndum, ið sum heild standa sum heimleysir prýðislutir eitt sindur tilvildarliga runt um í skálanum í vindeygakørmum o.ø. Listasøguligu varðarnir Jack Kampmann og William Heinesen eru ikki við á framsýningini, - tvs. síðstnevndi er bert umboðaður við tveimum elasmáum klippmyndum (tær á reseptbjálvunum hjá apotekinum), ið ikki nýtast at vera har í løgnum selskapi við eitt nú fotomyndirnar hjá Annie Heinesen, ið als ikki hoyra heima á einum tjóðarlistasavni. Tær eru ikki nóg góðar til tess og sama er galdandi fyri Jónu Rasmussen, sum ósamsvarandi er eitt hitt best umboðaði grafikarin í framsýningini. Framúrskarandi grafisk listafólk sum Marius Olsen skuldi verið nógv betri umboðað, eins og einastandandi grafikkurin hjá Tóroddi Poulsen, sum ikki er til staðar á grafikkgongini. Við greiðum undantaki í fantastisku prentunum hjá Janusi Kamban og Elinborg Lützen er grafikkúrvalið sum heild ikki serliga gott, serliga tá hugsað verður um samtíðarlistina og tey mongu framúrskarandi grafisku verkini, sum hava sæð dagsins ljós í Grafiska Verkstaði Føroya. Her í grafikkgongini hongur tekstilparturin av framsýningini, sum er so mikið pírin, at hann ikki nýttist at verið har við undantaki í Titu Vinther, hvørs eina verk er so mikið gott, at fleiri eru vælkomin.

### Samtíðarlistin manglar

Framsýningin er so mikið lítil, at tú uttan at vita av tí ert komin runt og meðan tú ørkymlað skymast rundan um teg, stingur tankin seg upp um tað, sum manglaði, Jóannis Kristiansen og Frimod Joensen, men eisini William Heinesen og Jack Kampmann, sum á ymiskan hátt eru